

# Granskarar til Fiskimálaráðið

Fiskimálaráðið FISKIVINNU GRANSKING

Fiskimálaráðið søkir eftir tveimum granskingarleiðarum og einum búskapargranskara til komandi granskingarverkætlanir hjá Fiskivinnugransking.

## Granskingarleiðarar

Talan er um leiðarastørv í tveimum granskingarkjarnum, ið skulu arbeiða við ávikavist framleiðslutøkni og veiði- og reiðskapstøkni. Dentur verður lagdur á ávikavist at fáa meira burturúr allari hjávøru (biotøkni) og at minka um oljunýtslu. Talan er í fyrsta umfari um trý ára verkætlan.

## Búskapargranskari

Talan er um granskarastarv til at greina fíggjarliga virðið á millumlandaavtalum Føroya við onnur lond. Talan er í fyrsta umfari um níggju mánaða verkætlan.

### Faklig krøv og ynski

Vit vænta, at tú sum granskari

- hevur granskingarførleika og ert forvitin
- hevur eitt skipað og málrættað arbeiðslag
- hevur góð leiðslu- og samstarvsevni
- hevur viðkomandi akademiska útbúgving og eftirútbúgving
- hevur hollar granskingarroyndir

Viðv. búskapargranskaranum verður hugsað um nýútbúnan búskaparfrøðing, sum hevur áræði og hug at granska víðari. Viðkomandi skal eisini lesa og skilja føroyskt.

### Vit bjóða

Vit bjóða trý spennandi størv, har tey settu í stóran mun sleppa at skapa og ávirka innihaldið eftir bestu sannføring síni saman við einum stýrisbólki.

### Setanarviðurskifti

Størvini verða sett eftir avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið er Fiskimálaráðið, og arbeiðsstaðurin verður í Havn. Byrjað verður 1. apríl 2009 ella eftir avtalu.

### Umsóknir

Umsóknir við avritum av prógvum, CV og viðmælum skulu sendast til:

Fiskimálaráðið,
att. Jákup Mørkøre, samskipari í Fiskivinnugransking,
P. O. Box 347, Heykavegur 6A,
110 Tórshavn

Skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi **23. februar 2009**. Umsóknir kunnu vera á føroyskum, norðurlendskum ella enskum máli.

### Meira at vita?

Meira fæst at vita um størvini á www.fvg.fo ella við at venda sær til Jákup Mørkøre, tlf. 35 30 30, jakupmo@fisk.fo, ella Hjalta í Jákupsstovu, stýrisformann, tlf. 35 39 00.

*Sí meira um Fiskivinnugransking á www.fvg.fo.*

**Um Fiskivinnugransking:** *Fiskimálaráðið hevur á løgtingsfíggjarlógini tvær játtanir til gransking og menning. Undir einum verða hesar játtanir nevndar Fiskivinnugransking. Dagligu umsitingina av granskingini hava samskipari ráðsins og ein stýrisbólkur, ið er mannaður við trimum umboðum úr fiskivinnuni og trimum umboðum frá almennum stovnum. Sí meira um Fiskivinnugransking á www.fvg.fo.*

SENDISTOVAN

# SÁLAR–FRØÐINGAR

**Sernámsdepilin søkir eftir tveimum sálarfrøðingum. Einum til NSR-tænastuna í Tórshavn og einum til NSR-tænastuna í Eysturoynni.**

## SETANARTREYTIR

Størvini verða sett sum skjótast og sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Akademikarafelag Føroya.

## UMSÓKNIR

Umsóknir við prógvum, CV og øðrum viðkomandi skjølum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 27. feb. 2009 kl. 12.00 og skulu sendast til snd@snd.fo ella til:

**Sernámsdepilin, Frælsið 32,**
**Postboks 2036, 165 Argir**

Fleiri upplýsingar fáast frá Emmy Joensen, stjóra, tlf. 36 02 00, emmy@snd.fo, Hans J. Thomsen, samskipara í Eysturoynni, tlf. 23 91 90, ella frá Harriet Hansen, samskipara í Tórshavn, tlf. 30 23 70.

## UPPGÁVUR

- Kanna børn og ung upp til 18 ár
- Hava samrøður við børn og ung upp til 18 ár
- Ráðgeva og samstarva við tey, sum eru um børnini
- Samskipa námsfrøðilig tiltøk
- Skipa fyri fyribyrgjandi tiltøkum í samráð við skúlar og dagstovnar

*Sernámsdepilin veitir sernámsfrøðiliga ráðgeving til børn og ung frá 0–18 ár.*

*NSR er stytting fyri náms- og sálarfrøðiligu ráðgeving depilsins. NSR-tænasturnar eru skipaðar í Eysturoynni, Suðuroynni og í Tórshavn.*

*Sí annars www.snd.fo.*

## FØRLEIKAKRØV

Umsøkjarar skulu hava útbúgving sum cand. ped.psyk. ella cand.psyk.

Harumframt vænta vit, at umsøkjarar:

- Hava autorisatión ella eru sinnaðir at útvega sær hesa
- Kunnu arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevni
- Hava førleika at menna sernámsfrøðiliga virksemið
- Hava áhuga fyri avbjóðingum og eru fúsir til at royna nýggjar leiðir

## VIT BJÓÐA

- Eitt áhugavert og avbjóðandi starv við fjølbroyttum uppgávum
- Eitt fakliga mennandi umhvørvi saman við sálarfrøðingum, fysio- og ergoterapeutum, talilærarum, audiologopedum, námsfrøðingum og ráðgevum
- Kollegiala supervisión og neyvt samstarv við hinar sálarfrøðingarnar í skipanini
- Førleikamenning eftir umstøðum og tørvi

Hevur tú ikki autorisatión, skipar Sernámsdepilin fyri, at tú kanst útvega tær hesa.

**SND**
**SERNÁMSDEPILIN**

SENDISTOVAN